# Fleiri túrar hevur eingin seta verið niðanfyri 10.000 pund

**- Toskurin er smáttfallandi og heldur rak, men eg haldi ikki, vit longu nú kunnu siga, at hetta verður sum fyrst í nítiárunum, sigur Niclas Højgaard, sum siglir við línuskipinum, Volunteer**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Í longri tíð hava línuskipini havt rokfiskiskap burturav.

Eisini tey smærri línuskipini hava fingið nógvan fisk. Eitt teirra er Volunteer, sum Jack Højgaard eigur. Við skipinum eru seks mans.

Hóskvøldið skiftu vit orð eina løtu við sonin, Niclas, sum eisini er við skipinum.

Hann sigur, at tað hevur gingið óføra væl hjá teimum nógvar teir seinastu túrarnar.

- Seinastu tríggjar túrarnar hava vit verið úti í 14 dagar tilsamans, ávikavist 4 dagar, 6 og síðan aftur 4 dagar.

Niclas sigur, at tann fyrsta av hesum túrurum høvdu teir 45.000 pund, annan 70.000 og triðja túrin aftur 45.000 pund.

Hetta gevur 160.000 pund í 14 fiskidagar hjá 6 monnum, og tað má sigast at vera óført.

Volunteer hevur egningarmaskinu. Ein seta hjá teimum svarar til umleið 50-60 stampar av teimum gomlu. Tað merkir, at fiskiskapurin seinastu túrarnar hevur ligið um 200 pund og meiri á stampin.



*Niclas Højgaard, sum burturav hevur verið við línuskipinum, Volunteer, síðan 1997, heldur ikki, vit longu nú skulu óttast, at gongdin í fiskivinnuni verður sum fyrst í nítiárunum.*
*- Eg haldi, tað er ov tíðliga at gera ta niðurstøðuna longu nú, sigur hann.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Øgilig skrift

Niclas sigur, at teir seinastu túrarnar hava roynt vestan fyri Suðuroynna. Umleið 2/3 av veiðini hevur verið smáttfallandi toskur, og seinastu triðingurin hevur verið hýsa.

- Undan hesum túrunum royndu vit suður úr Mykinesi, men vit góvust har, tí hýsan var so smá, og lítil prísur fæst fyri hana. Á hesi leiðini var umleið 2/3 av veiðini hýsa og seinasti triðingurin toskur.

Niclas sigur, at tað hevur verið ein øgilig skrift at sæð á ekkoloddinum á leiðini suður úr Mykinesi í heyst og eisini í summar, og har hevur eisini nógvur fiskur verið at fingið.

Sum skilst, eru loddini so mikið góð í dag, at línubátarnir seta ikki uttan so, at skrift er at síggja.

- Er eingin skrift, fæst næstan heldur einki, sigur hann.

Niclas vísir á, at skriftin sæst betur, tá ið roynt verður á harðari botni enn á bleytum botni.

### Toskurin rak

Vit spurdu línumannin, um toskurin, teir fáa, er so rak, at tað fellir manningini í eyguni.

- Tað var pápi sum bar uppá mál, at toskurin er rak. Sjálvur hevði eg ikki hugsað stórvegis um tað. Tað er minni uppi á fiskinum, enn tað hevur verið, og búkurin er minni. Men eg haldi ikki, at toskurin er so rak, at tað fellir manningini í eyguni, sigur hann.

Niclas hevur verið við Volunteer burturav síðan 1997.

- Eg haldi ikki, vit longu nú skulu óttast, at gongdin verður sum fyrst í nítiárunum, tá ið toskurin hvarv. Tað er ov tíðliga at gera ta niðurstøðuna longu nú, heldur hann.

Meðan vit práta, verður tosað um fiskin, sum sigst leita inn undir land eftir føði.

Men hvussu gongur so úti á, spyrja vit.

- Tey størru línuskipini fáa eisini nógvan fisk. Morgunsatjørnan er júst komin aftur av túri við 176.000 pundum, sigur Niclas Højgaard.

# Farvæl tú smali vegur

**Vegastrekkið um Gøtueiði er nú um at vera liðugt. Vegurin er breiðkaður og gjørdur beinur, og nú verður tað seinasata asfalterað**

VEGAGERÐ
*Edvard Joensen*

**Gøtueiði:** Smali vegurin við argandi svinginum um Gøtueiði er ikki meir. Hann er avloystur av einum breiðum, beinum vegastrekki.

Vegagerðin er um at vera endaliga liðug nú, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur. Breiðkingin er gjørd, og vegurin verður nú asfalteraður. Í næstu viku kemur ein bilur úr Noreg at seta autoverju upp ymsastaðni í landinum. Hann byrjar mánamorgunin á tunnilsvegnum í Vágum, og fer síðan undir Gøtueiði. Tá tað er gjørt, er endaliga liðugt har, sigur Oyvindur Brimnes.

Arbeiðið hevur tikið sína tíð. Eini fýra ár ella so. Men tað kemst av ymsum grundum, sigur landsverkfrøðingurin.

Í fyrsta lagi hevur bara verið arbeitt fyri smæri, spjaddar játtanir. Í øðrum lagi er sera nógv ferðsla eftir strekkinum, sum ongantíð hevur verið stongt. Øll ferðslan úr Leirvík, Gøtu og Fuglafirði kemur tann vegin. Tá eru norðoyingar eisini uppií.

– Einir 3.000 bilar um samdøgurði hava ferðast handan vegin, meðan arbeitt hevur verið, metir Oyvindur Brimnes, so tað er greitt, at tað hevur órógvað.

Fólkið, sum hevur abreitt við vegin um Gøtueiði, er nú farið í Kallsoynna, har arbeitt verður millum Knúksdal og Syðradal.

Annars er ikki tað stóra í gongd hjá landsverkfrøðinginum í løtuni. Í Gásadalstunlinum verður tó arbeitt av fullari kraft, og ætlanin er at koma ígjøgnum fyri jól. Men á Skála er steðgur í, og tað sama er í Havnardali. Eingir pengar eru eftir, sigur landsverkfrøðingurin.



*Vegurin um Gøtueiði er nú liðugur, og eftir er bert at asfaltera og seta autoverjuna upp*
*Mynd: Edvard Joensen*



UTTAN ÚR HEIMI

# Arbeiðsloysið veksur skjótt í Danmark

**Rættiliga óvæntað vísa seinastu tølini, at nógvir danir eru vorðnir arbeiðsleysir seinastu mánaðarnar.**

DANMARK
*Árni Joensen*

20.200 danir gjørdust arbeiðsleysir í juli ársfjórðingi, og tað hevur skelkað donsku búskaparfrøðingarnar, sum høvdu mett, at talið fór at liggja um 5.000. Men tølini hjá donsku hagstovuni vísa, at 5.100 fólk í byggivinnuni mistu arbeiði frá juli til oktober, samstundis sum 6.700 fólk í ídnaðinum gjørdust arbeiðsleys. Harafturat vísa tølini, at kommunurnar hava sagt 3.400 fólkum úr starvi í sama tíðarskeiði.

Johnny Bo Jakobsen, búskaparfrøðingur hjá Nordea-bankanum, heldur gongdina vera eitt tekin um, at arbeiðsmarknaðurin megnar ikki at standa ímóti teirri búskaparligu aftur-gongdini longur. Hann sigur, at danir tí kunnu rokna við, at uppaftur fleiri fara at missa arbeiðið næstu mánaðarnar.

Tølini hjá hagstovuni vísa eisini, at danska arbeiðsmegin minkar, og tað er beint tað øvugta av tí, sum stjórnin hevði væntað. Útrokningar hjá arbeiðsgevarafelagnum vísa, at arbeiðsmegin er minkað so nógv í ár, at skulu framrokningarnar hjá stjórnini fyri árið í ár halda, skulu 94.000 arbeiðstakarar koma afturat teir seinastu tríggjar mánaðarnar í ár. Og tað er óhugsandi.

# Leggja størri dent á trygd á sjónum



*Ein spanskur oljureinsingarmaður . Nú ætlar ES at bera skjótt at, so tílíkt ikki skal henda aftur*

**Eftir vanlukkuna við "Prestige" fer ES at virka fyri betri trygd á sjónum.**

UMHVØRVI
*Árni Joensen*

ES ætlar sær at taka við læru av tilburðinum við tangaskipinum "Prestige", sum fór til botns úti fyri sponsku útnyrðingsstrondini fyrr í vikuni.

ES-kommiserurin í flutningsviðurskiftum, Loyola de Palacio, segði í Evropatinginum hósdagin, at ES-londini eiga at skunda undir nýggja lóggávu um trygd á sjónum, so tað, sum nú hendir á sponsku útnyrðingsstrondini, ikki skal henda aftur.

-Hesin tilburðurin eigur at fáa okkum at skipa so fyri, at hetta verður tann seinasti tilburðurin av hesum slagnum - bæði við okkara stendur og aðrastaðni, segði hon.

ES-nevndin mælti í síni tíð til at banna tangaskipum við einkultum skrokki at sigla í evropeiskum sjógvi, men viðgerðin í teimum einstøku limalondunum tók so drúgva tíð, at bannið er ikki komið í gildi enn.

# Frambrot innan heilivág ímóti krabbameini

**Amerikanskir granskarar hava gjørt ein heilivág, sum kann vísa seg at hjálpa væl ímóti krabbameini í lívmóðurhálsinum**

HEILSA OG HEILIVÁGUR
*Árni Jornsen*

Tað skrivar tað viðurkenda læknatíðarritið New England Journal of Medicine.

Heilivágurin, sum amerikansku granskararnir hava ment, verður nú royndur. Sambært granskarunum ger heilivágurin, at kvinnur verða mótstøðuførar ímóti einum virusi, sum tær fáa ígjøgnum seksuella samveru, og sum á hvørjum ári kostar fleiri hundraðtúsund kvinnum kring heimin lívið.

1.533 kvinnur hava sjálvbodnar tikið lut í kanningunum hjá granskarunum. Helmingurin av kvinnunum fekk tann nýggja heilivágin, meðan hin helmingurin fekk okkurt, sum kortini onga ávirkan hevur. Tað vísti seg, at eingin av teimum kvinnunum, sum høvdu fingið tann nýggja heilivágin, fekk virusið HPV, sum kann elva til krabbamein í lívmóðurhálsinum. Av hinum kvinnunum vórðu 41 smittaðar við HPV.

Kvinnurnar, sum tóku lut í kanningini, vóru millum 16 og 23 ár, og granskararnir siga, at tað er umráðandi, at kvinnurnar fáa heilivágin, áðrenn tær av álvara gerast kynsliga virknar. Amerikansku granskararnir siga, at tann nýggi heilivágurin, sum kvinnurnar skulu taka tríggjar ferðir í einum seks mánaða skeiði, kann forða fyri krabbameini í lívmóðurhálsinum, men hann kann ikki lekja kvinnur, sum longu hava fingið krabbamein har.

Granskararnir siga, at menn eiga eisini at taka tann nýggja heilivágin. Sjálvt um menn av góðum grundum ikki kunnu fáa krabbamein í lívmóðurhálsinum, eru teir medvirkandi til at breiða virusið, sum ger kvinnurnar sjúkar.

## Versnar hvønn dag

Ósemjan millum Danmark og Russland um kekenska varaforsætisráðharran Akhmed Zakajev er komin nógvum donskum útflutningsfyritøkum illa við, og summar teirra hava steðgað sínum samhandli við russar.

Tað hevur víst seg, at russiska tolleftirlitið ger serliga nógv burturúr, tá danskir lastbilar koma til markið, og tað hevndir javnan, at bilarnir noyðast at bíða í fleiri dagar eftir teimum neyðugu innferðarskjølunum. Hetta kostar nógvar pengar, og tí hava summar danskar fyritøkur valt at steðga útflutninginum til Russlands. Aðrar fyritøkur royna at halda á, tí tær bera ótta fyri at missa sambandið við tann góða og veksandi russiska marknaðin.

## Fyrsti dómur í 350 ár

Sum tann fyrsti limurin í enska kongshúsinum seinastu 350 árini hevur Anna prinsessa fingið dóm í einum enskum rætti. Tað hendi hósdagin, tá prinsessan viðgekk, at hundur hennara hevði bitið tvey børn. Anna prinsessa varð dømd at gjalda 790 pund í bót. Harðasta revsingin í hesum føri er seks mánaða fongsul.

Bretskir rættarserfrøðingar siga, at dómurin hjá Onnu prinsessu er tann fyrsti, sum ein limur í enska kongshúsinum hevur fingið, síðani Karl kongur Fyrsti varð dømdur til deyða og hálshøgdur í 1649.

Í slíkum málum er rættiliga vanligt, at hundurin, sum beit, skal avlívast, men so var ikki í hesum føri. Dómarin gav kortini prinsessuni boð um at ansa betur eftir hundinum, og hann legði afturat, at bítur hann fólk eina ferð afturat, skal hann avlívast.

Her kann verða skoytt uppí, at sjálv stevningin í hesum málinum kann tykjast rættiliga skemtilig. Í rættarbókini stóð: Elizabeth drotning ímóti Anne Elizabeth Alice Louise. Við øðrum orðum: Móður ímóti dóttur.

## Ósamdir politikarar

150 limir í amerikanska umboðsmannatinginum hava kunngjørt, at teir styðja ein iranskan andstøðufelagsskap, sum stjórnin hjá Bush forseta hevur skrásett sum yvirgangsfelagsskap.

Teir 150 politikararnir siga í kunngerðini, at felagsskapurin MKO er ein lógligur andstøðufelagsskapur, og at hann eigur at verða strikaður av amerikanska yvirgangsyvirlitinum alt fyri eitt.

Í september avdúkaði blaðið Newsweek, at amerikanski løgmálaráðharrin, John Aschroft, hevði havt samband við iranska felagsskapin. Hetta kom bæði løgmálaráðharranum og stjórnini illa við, tí MKO hevur staðið í amerikanska yvirgangsyvirlitinum líka síðani 1997.

MKO sigur seg hava einar 30.000 vápnaðar limir, og amerikanska uttanríkisráðið vil vera við, at felagsskapurin hevur skipað fyri fleiri bumbuatsóknum í Iran, og at hann hevur beint fyri fleiri iranskum leiðarum. Amerikanarar vilja eisini vera við, at MKO myrdi amerikansk sivilfólk í Iran í sjeytiárunum.

Tað, sum serliga ørkymlar amerikansku stjórnina, er, at MKO hevur høvuðsskrivstovu í irakska høvuðsstaðnum Bagdad, og at felagsskapurin uttan iva fær stuðul frá Saddam Hussein.

Í republikanska flokkinum hjá Bush forseta er ikki semja um støðuna hjá MKO. Ilena Ros-Lehtinen, sum er republikanskur limur í umboðsmannatinginum, sigur, at MKO er ein demokratiskur andstøðufelagsskapur, sum USA eigur at viðurkenna.